TILTØK

Gudstænastur
1. sunnud. e. trettanda
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
Argir: kl. 11, Heri Joensen
Bøur: kl. 12, altarg., David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri heidningamissiónina
Sørvágur: kl. 12, Inga Poulsen Dam. **Í vestmanna kirkju** gongur talvan fyri Heidningamissiónina
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10, *Christianskirkjan:* kl. 11, lestur. Talvan gongur fyri kristniboðan í øðrum londum
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
Fríðrikskirkjan: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Skálafirði: kl. 11, *Oyndarfjørður:* kl. 12.10, altarg., Jógvan Friðriksson
Funningur: kl. 12 messa, *Gjógv:* kl. 17 messa, Emil Olsen
Haldórsvík: kl. 12, Mogens T. Christensen
Hellurnar: kl. 12, altarg., Uni Næs. **Í Fuglafjarðar kirkju** gongur talvan fyri heidningamissiónina
Skálavík: kl. 12, Jákup R. Hansen
Fámjin: kl. 12, útvarpsgudstænasta, Jónsvein Bech
Sandvík: kl. 12, Ólavur Ramussen
Hov: kl. 12, Patrick de Neergaard

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti. Evnið: Endurføðingin – at verða Guds barn. Talari: Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Hebron, Argir
Leygarkvøldið kl. 19 verður nýggjársveitsla.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Karl Johan Nielsen av Vatnsoyrum.
Eingin sunnudagsskúli verður kl. 12, men kl. 15 verður nýggjársveitsla fyri børnum.
www.hebron.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

Frelsunarherurin, Tórsgøta
Sunnudagin kl. 17 Ársveitsla fyri soldátum – tilhoyrandi og vinum (tilmeldan).
Mánadagin kl. 17 og 19 skótamøtir.

Meinigheitshúsið
Heimsbønarvika er hesa vikuna, og er møti hvørt kvøld má.-leygardag kl. 20.
Leygardagin kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 endar heimsbønarvikan við møti v/ Ejvind Mouritsen.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu steðunum, kl. 18 Møti.

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Fríggjakvøldið kl. 20-22 byrjar JC-Teens aftur.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt (fyri m.a. valinun).
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Havnar kirkja
Várkonfirmationirnar 2004 verða 21. mars, 28. mars og 4. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mikudagin 14. januar kl. 15.
Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

Vesturkirkjan og Argja kirkja
Várkonfirmationirnar 2004 verða í Vesturkirkjuni 28. mars og 4. apríl og í Argja kirkju 4. apríl.
Konfirmantarnir skulu møta í Vesturkirkjuni mikudagin 14. januar kl. 15. Markið millum vestaru og eystaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið »Familjan og hugni«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um »Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Laodikea«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina. www.livdin.fo

Aglow-Føroyar
Skeið við Birgit Tind frá Apostolsk Højskole í Kolding verður í Evangeliihúsinum í Havn fyri allar Aglow-áhugaðar kvinnur 13.-14. februar 2004. Tilmelding á tlf. 447825 ella 217825 innan 3. feb.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Poul Johannesen trúboðara í Klaksvík.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 Taizekvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, har Levi Joensen og aðrir tala og yngra kvartettin úr Betesda luttekur. Øll eru vælkomin.
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti. www.ebenezer.fo

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin 12. januar kl. 19.30. Sjómanskvinnuringurin á Argjum verður við.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, onki møti vegna fráferðarsamkomu fyri Jórun og Nurlan Malaikev í missiónshúsinum í Hvalvík kl. 18. Missiónsvikan byrjar týsdagin 13. januar, har Mogens Tilsted Christensen talar og sangbólkurin Gittit syngur.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11 við Eiler Johannesen. Eisini verður innsetan av fyristøðuparið.
Týskvøldið verður bønarmøti við Fríðbjørn Poulsen.

Meinigheitshúsið, Sandavágur
Familjugudstænasta verður í kirkjuni kl. 15, ístaðin fyri sunnudagsskúla. Inga Dam, Barnakórið og Ungdómskórið úr Vágum luttaka. Møti verður í Meinigheitshúsinum kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltøkini.

Aglow-Føroyar
Vikuskifti fyri menn í Libanon í Sørvági 23.-25. apríl 2004. Talari verður Børge Porsen, Kolding. Tilm. á tlf. 447825 ella 217825 v/ Rannvá Royðutoft innan 1. apríl 04.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Útsending av familjuni Malaikev. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Hans Kristian Johannesen, ungdómsráðgeva. Evnið: Eg trúgvi, og hvat so!? Aftaná møti verður drekka, øl eru vælkomin.

Skúlin í Skálafirði
Missiónsvikan er í dognum frá 7.-11. januar.
Leygardagin kl. 20 tala og syngja Jónhilda og Gulak. (Innsavnan til Heimamissiónina).
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 talar Niels Jacob Nielsen og Jónhilda og Gulak syngja.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Nerija, Skála
Nýggjársveitsla verður sunnudagin kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívsins Orð, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og ungdómsmøti kl. 20. Øll eru vælkomin.

Gøta
Týsdagin kl. 20, Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v. Peter O. K. Olofson: 1 Thess 1.

Missiónshúsið í Gøtu
Leygarkvøldið 10. januar kl. 20 Ungdómsmøti í kirkjukjallaranum við Jóhannus Mikkelsen av Skála.
Sunnukvøldið kl. 18 Sjómans- og nýggjársveitsla í kirkjukjallaranum, har Jógvan Friðriksson, prestur, hugleiðir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Í sambandi við alheims bønarvikuna verður bønarmøti hvørt kvøld hesa vikuna kl. 19.30.

Aglow-møti
verður í Hæddini í Runavík leygardagin 10. januar kl. 15. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið í Leirvík
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 v. Hasseman Mikkelsen.
Kl. 21 Ungdómsmøti við Ásbjørn Berthelsen.

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Øssur Kjølbro, evnið: **Altarborðið. Eisini verður kunnað um túrin til Ísraels á páskum**.
Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

Getsemane, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Jólafest fyri vaksin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Striðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Rósing Lydersen, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Birgit Nielsen, Jeannu Viderø og Myrku Hauritz. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow, Suðuroy
Møti verður í húsinum hjá Matmoðrafelagnum í Vági leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eddie Bech talar.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Betania, Porkeri
Týskvøldið kl. 20 Kvinnumøti.

Bygdarhúsið í Lopra
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frá Randers
Føroyskt møti verður í »Saron«, Steen Blichers Gade 1C, sunnudagin 11. jan. kl. 15 við Hera Elttor, túboðara. Aftaná verður hugnalig samvera við kaffi o.ø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Trettandahald í Ballerup
Leygardagin 10. januar kl. 19.30 halda vit trettanda við føroyskum dansi og einum góðum bita í sethúsunum á Ryttergården í Pederstrup.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 12. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 10.15-12 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagur 13. januar
kl. 10-11.30 Sangur. Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Byrja at samla gamlar myndir frá barnaárunum til eina framsýning. Alt hevur áhuga
Mikudagur 14. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur.
kl. 15 Túrur (sjá skránna í bløðunum)
kl. 15-21 Opið hús
Hósdagur 15. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen. Aftaná føroyskur dansur: børnini á býlingshúsinum á Norðasta Horni vísa sítt dansikynstur
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagur 16. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Frá Eldrafelagnum Nón Saltangará
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið kl. 19.30 til Hugnaløtu og burturluting. Nýggir limir eru vælkomnir við.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 12. januar
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
Týsdagin 13. januar
Vit fáa vitjan av politikarum. Drekkamuður – framløga
Mikudagin 14. januar
Videofilmur verður vístur: tikin í Føroyum tá pensionistar úr Svendborg vitjaðu summarið 2003 – Drekkamuður
Hósdagin 15. januar
Drekkamuður.
Vit syngja sálmar og sangir
Fríggjadagin 16. januar
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mánadagin 12. januar
Vit fara at spæla Boccia. Vit møtast í Virkinum á Sandi kl. 14. Elna Skylv, ítróttarráðgevi hjá ÍSB kemur at leggja okkum lag á.
Mikudagin 14. januar
Upplestur
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 10. januar Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 11. januar Eiði, tlf. 42 30 06

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

TILTØK

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan er stongd. Opið er aftur týsdagin 6. januar 2004. Ringjast kann til tlf. 314827. Teldupostur: javni@post.olivant.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

LISA -
Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686.
Umsóknarblað til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyskt felag í Ballerup
Ryttergården, Pederstrup
2750 Ballerup.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Friðli tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir:
mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur:
radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða:
www.radgevingin.dk

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakóríð venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links viða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vílt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtíð týsdag kl. 17-18.
Kórvenjing týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólika vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Árstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altið vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Århus.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Øyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýrin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.